VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið



Veðrið í dag:
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av útsynningi og stundum regn – kanska mjørki. Hitin millum 8 og 11 stig.



Veðrið hósdagin:
Um morgunin lot til andøvsgul av útnyrðingi og turt. Men um middagsleitið stívt andøvsgul av útsynningi og regn eitt skifti, annars támut veður. Hitin millum 7 og 10 stig.



Veðrið fríggjadagin:
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útsynningi og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 5 og 8 stig.

Veðrið leygardagin og sunnudagin:
Gul til stívt andøvsgul av vestri og leygardagin yvirhøvur turt og sólglottar, men sunnudagin ælingur. Hitin millum 5 og 9 stig.

Ellisheimið í Havn 65 ár:

Tíðarhvarv

BÓKAÚTGÁVA

Ingrid Bjarnastein



Jákup Lindenskov við bókini Tíðarhvarv, sum hann sjálvur hevur skrivað
Mynd: Jens Kr. Vang

Í gjár klokkan 11 var kjallarin á Ellisheiminum í Havn karmur um hugnaliga móttøku í samband við, at útgivin er bók til 65 ára føðingardagin hjá heiminum. Sjálvur føðingardagurin var 15. august 2000, og nú, eitt gott ár aftaná, er bókin klár.

Bókin ber heitið Tíðarhvarv við undiryvirskriftini Ellisheimið í Havn. Jákup Lindenskov er høvundurin aftanfyri bókina, og var hann eisini tilstaðar í hugnaliga umhvørvinum á Ellisheiminum í gjár.

Í taluni, sum Jákup Lindenskov helt fyri fólkunum, ið vóru komin saman í samband við útgávuna, sigur hann, at bókin lýsir 20 árini upp til 30 árini og viðurskiftini, sum tey higartil hava verið.

– Eg havi eisini skrivað um ættir í Havn, og er tað gjørt fyri at gera søguna um heimið meira livandi, greiðir Jákup frá.

– Myndirnar í bókini geva hugflog – tær siga frá. Eitt yvirlit er í bókini fyri at lætta um. Hetta tí, at um ein hevur hug at lesa eitt ávíst evni, so er tað lættari at finna fram, og ger hetta tað eisini møguligt at lesa bókina í brotum.

Bókin er skrivað í samráð við fyristøðuna á Ellisheiminum, og kemur hon at kosta ávíkavist 190 krónur við stívari permu og 160 krónur fyri eina paperback útgávu.

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	÷5
Nuuk	3
Qaqortoq	1
Ammassalik	÷2
Saint John's	3
Halifax	0
Reykjavík	÷1
Seyðisfjørður	÷2
Tórshavn	0
Lerwick	1
Aberdeen	4
London	10
Tromsø	0
Bergen	0
Oslo	–
Stokkhólm	3
Keypmannah.	7
Helsinki	÷1
Moskva	1
Berlin	5
Warzawa	3
Kiev	4
Bukarest	12
Paris	10
Madrid	13
Róm	18
Malorca	12
Athen	21
Malta	22
Tunis	16
Beijing	6
New Dehli	26
Bangkok	31
Jakarta	34
Sydney	–
New York	8
Miami	23
Los Angeles	17
Meksikobýur	–
Panama	–
La Paz	17
Rio de Janeiro	–
Buenos Aires	21

LUFTTRÝSTIÐ



Ein lítil hátrýstryggur yvir Føroyum fer eystureftir, meðan eitt lágtrýst við Hvarvið fer í landnyrðing.



Lágtrýstið norðan fyri Ísland fer í landnyrðing, meðan eitt nýtt lágtrýst á 50N-43V fer norðureftir og hevur lýggja luft við sær til okkara leiðir.

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 11/11 kl. 06⁰⁰– 12/11 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 0,1°
Minsti hiti máldur í nov.: ÷7,2° Mesti hiti máldur í nov.: 12,2°

AVFALLIÐ



Avfallið: 0,1 mm – mált frá 11/11 kl. 06⁰⁰– 12/11 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í november: 48,2 mm

BILLUTIR
ÚTVEGAST TIL FLEST ALLAR BILAR
F.A. BILLUTIR
tlf. 421605 fax 421666

Spf.
...hvør sigur at vit eru sum onnur?
HESTPRENT
Dvørgastígur 7
100 Tórshavn
tel 31 45 55
fax 31 80 26
hestoy@hestprent.fo

VESTFALLSKYRRINDI

8. nov.: Seinna kvarter
11. nov.: Mánin næstur jørðini
15. nov.: Tendring

Keldu: Almanakkin 2001

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	sp.	Vestmannasundi fp.	sp.	Mykinesfirði fp.	sp.	Nólsoyarfirði fp.	sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	sp.	Hvannasundi fp.	sp.	Fugloyarfirði fp.	sp.
13. nov	04.31	16.55	03.31	15.55	03.46	16.10	06.31	18.55	07.31	19.55	02.46	15.10	01.46	14.10	04.46	17.10	05.46	18.10	04.16	16.40	05.31	17.55
14. nov	05.20	17.45	04.20	16.45	04.35	17.00	07.20	19.45	08.20	20.45	03.35	16.00	02.35	15.00	05.35	18.00	06.35	19.00	05.05	17.30	06.20	18.45
15. nov	06.20	18.35	05.20	17.35	05.35	17.50	08.20	20.35	09.20	21.35	04.35	16.50	03.35	15.50	06.35	18.50	07.35	19.50	06.05	18.20	07.20	19.35
16. nov	07.01	19.27	06.01	18.27	06.16	18.42	09.01	21.27	10.01	22.27	05.16	17.42	04.16	16.42	07.16	19.42	08.16	20.42	06.46	19.12	08.01	20.27

5 707265 100036 >